# Oljuútgerðarhavn á samgongufund

*Brot á samstarvið í samgonguni, um tjóðveldisfólk atkvøða fyri Javnaðarfloksuppskoti í sambandi við oljuhavn sigur Sjálvstýrisflokkurin*



*– Vit halda, at Hergeir Nielsen hevur meira ella minni spælt fríspæl í hesum máli. Vit vita hvørki, hvar hann ella flokkur hansara stendur, sigur Jákup Sverri Kass*

Jan Müller

Tjóðveldistingmaðurin í Suðuroynni, Hergeir Nielsen, skal mánadagin svara, um hann ætlar sær at atkvøða saman við samgonguflokkunum ella fyri einum broytingaruppskoti hjá Javnaðarflokkinum í málinum um eina komandi oljuútgerðarhavn. Tingmenn og landsstýrismaður sjálvstýrisfloksins hava biðið um at fáa málið viðvíðkjandi oljuhavnini á samgongufund mánadagin. Teir meta útmeldingarnar hjá tjóðveldistingmonnum at vera so ónøktandi fyri samstarvið í samgonguni, at teir nú vilja hava greitt at vita, um tjóðveldistingmenn ætla sær at atkvøða ímóti uppskotinum hjá landssstýrinum til 1. útbjóðing. -Vit taka tað sum givið, at Hergeir fer at stuðla samgonguni, men vit fara at spyrja hann kortini. Vit halda, at Hergeir Nielsen hevur meira ella minni spælt fríspæl í hesum máli. Vit vita, hvørki hvar hann ella flokkur hansara stendur. Jákup Sverri Kass metir tað vera brot á samstarvið í samgonguni, um tjóðveldismenn atkvøða fyri uppskoti Javnaðarfloksins.

Annars sigur Jákup Sverri Kass úr Sjálvstýrisflokkinum seg vera sera ónøgdan við, at 2. viðgerð av uppskotinum til útbjóðing ikki er komið fyri tingið hesa vikuna. Hann veit ikki, hví tingformaðurin ikki longu hevur sett tað á skránna. Næsti tingfundur er týsdagin, og tá er málið heldur ikki á skránni.

Finnbogi Ísakson, tingformaður sigur við Sosialin, at útbjóðingin kemur fyri tingið mikudagin og verður tað samtykt tá kann tað blíva endaliga samtykt fríggjadagin í næstu viku. Tingformaðurin sigur, at hann vildi ynskt, at tað hevði gingið skjótari at fingið hetta málið avgreitt, og ætlanin var eisini at hava tað fyri fríggjadagin. Men av tí at álitini ikki vórðu løgd fram fyrr enn seint mikudagin og her er talan um stórar broytingar, metti hann tað rætt at at geva tingmonnum longri skotbrá at umhugsa tey. Tingformaðurin vísir annars á, at jólini komu ímilum í hesum máli og tað er ein orsøk til, at tað hevur gingið seinni enn ætlað.

Hann veit annars einki um, at sjálvstýrisflokkurin skal hava biðið um at fáa spurningin um atkvøðugreiðsluna í útbjóðingarmálinum fyri á samgongufundi mánadagin.

# Fáa javnan arbeiðstilboð uttanlands

*ALS hevur júst fingið áheitan frá svenskari KT-fyritøku um at finna ungar føroyskar telefonseljarar til fyritøkuna. Leiðarin á ALS sigur slíkt javnan koma fyri*

John Johannessen

Fyri stuttum fekk ALS áheitan frá svenskari fyritøku um at finna ungar føroyingar at koma í starv hjá deildum hjá fyritøkuni, ávikavist í Svøríki og Danmark.

Tað ljóðaði, at talan var um eitt ógvuliga spennandi størv, men stjórin á ALS sigur, at talan er um eitt telefonseljaraarbeiði. Fyritøkuni nýtist 60 fólk, ið skulu sita við telefonina og selja telduútbúnað dagin langan.

– Hetta kann ikki metast sum nakað spennandi arbeiði, men tað er uttan iva ein møguleiki hjá ungum fólkum, ið ynskja at sleppa burtur heimanifrá eina tíð, sigur Elisabeth Gaardbo, stjóri á ALS.

### Norðurlendskt samstarv

Tað hendir seg javnan, at ALS fær tilboð frá fyritøkum úti í heimi - serliga úr Norðurlondum - um arbeiðspláss. Orsøkin til hetta er, at ávísingarnar í kenna til føroysku arbeiðsávísingina, ALS, gjøgnum norðurlendskt samstarv.

Sum skilst á Elisabeth Gaardbo, er tilboðið um tey 60 størvini á svensku KT fyritøkuni eisini sent arbeiðsávísingum í øðrum londum. Men leiðarin á ALS sigur, at føroyingar kortini hava góðar møguleikar at fáa starv hjá fyritøkuni, tí føroyingar duga ógvuliga væl mál, og er hetta týdningarmikið í slíkum starvi.

### Hava sent tilboðið út

– Vit hava sent arbeiðstilboðið út til fólk, ið hava tørv á atbeiði. Við arbeiðstilboðnum fylgir eitt umsóknarblað at fylla út. Hetta kunnu tey so senda okkum ella beinleiðis til fyritøkuna

Elisabeth Gaardbo greiðir frá, at arbeiðsloysisskipanin umframt at veita arbeiðsleysum pening, eisini virkar sum ein arbeiðsávísing, og tí senda tey ákheitanirnar frá fyritøkum út til fólk, ið hava tørv á arbeiði.

Talið av arbeiðsleysum í Føroyum liggur nú í einari fastari legu á umleið 800 fólk.



*Elisabeth Gaardbo tók við sum nýggjur stjóri á ALS 1. januar eftir Allan Skaalum*

***Mynd: Jens Kristian Vang***

ÚTSØLAN
byrjar mánamorgunin 31/1 kl. 9
hjá KISSA
Tórsgøta • Tlf. 311395



# Byggja út fyri 32 milliónir í Havn í ár

*Størsta upphæddin fer til at halda fram við arbeiðnum uppá Marknagilsvegin*

Áki Bertholdsen

Tórshavnar Býráð fer í ár at gera íløgur fyri 32 milliónir krónur.

Tað er greitt eftir býráðsfundin hóskvøldið, har í býráðið einmælt samtykti útbyggingarætlanina í ár.

Sostatt samtykti býráðið einmælt eitt tilmæli frá Mentamálanevndini um útbyggingar fyri 9,7 milliónir, umframt eitt tilmæli frá Sosialu nevnd um útbyggingar fyri 9,4 milliónir og eitt tilmæli frá teknisku nevnd um útbyggingar fyri 11,6 milliónir.

Tilsamans geva hetta útbyggingar fyri 30, 7 milliónir.

Restin skal brúkast til ymsar smáíløgur, sum ikki eru endaliga avgjørdar enn, men talan er eitt nú um at fríðka um kirkjugarðin og at leggja hita í kapellið.

### Venjingarhøll í Hoyvík og rennibreyt

Millum tær útbyggingar, sum býráðið nú hevur samtykt at fara undir, er, at ein venjingarhøll skal gerast í Hoyvík, umframt at skúlin har skal byggjast út.

Høllin verður eitt millumting ímillum eina venjingarhøll og eina ítróttarhøll, tí har verður pláss fyri 200-300 áskoðarum, varð upplýst á býráðsfundinum hóskvøldið.

Høllin skal verða liðug í mars mánaða komandi ár.

6,5 milliónir eru settar av til endamálið og 700.000 túsund eru settar av til at projektera skúlaútbygging í Hoyvík - og í Kaldbak.

Í sambandi við útbyggingina í Kaldbak skal m.a. fimleikarhøll gerast uppí skúlan har.

Harumframt hevur býráðið eisini samtykt at seta eina millión av til rennibreyt í ár.

Ætlanin er at seta eina millión av um árið í trý ár til rennibreyt. Men tað er ikki avgjørt enn, hvar hon skal vera.

Somuleiðis skal ein hálv millión brúkast til at umvæla og fríðka um tað hugnaliga Múllers Pakkhús, og ein millión skal brúkast til at byggja rás Tórshavn út, so at eisini kollfirðingar fáa somu sjónvarpstilboð sum havnarfólk, nú Kollafjarðar Kommuna er komin uppí Tórshavnar Kommunu. Í samstarvsavtaluni við Kollafjørð, hevur Tórshavnar Býráð bundið seg til at byggja út so at kollfirðingar eisini síggja Rás Tórshavn frá 1. januar komandi at rokna.

### 100 ansingarpláss

Tórshavnar Býráð ætlar eisini at byggja út á barnaansingarøkinum, og ætlanin er at útvega 100 ansingarpláss afturat í næstum.

Tilsamans skulu 6,9 milliónir brúkast til at útvega fleiri barnaansingarpláss í kommununi í ár.

1,5 millión skal brúkast til at byggja býlingshúsið Millum Gilja út fyri, og tað gevur 20 ansingarpláss afturat. Somuleiðis skal 1,6 millión brúkast til at byggja býlingshúsið á Ternuryggi út fyri og tað gevur somuleiðis 20 ansingarpláss afturat. Hesi 40 plássini verða liðug í ár.

Restin, 3,8 milliónir, skulu brúkast til ein nýggjan dagstovn í Vesturbýnum til 60 børn. Men hesin stovnurin verður ikki liðugur fyrrenn komandi vár aftur.

Harafturat skulu tvær milliónir brúkast at byggja læknamiðstøðina í Gundadali út fyri, so at pláss verður fyri tveimum læknum afturat og 500.000 krónur skulu brúkast til at byrja arbeiðið sambært eldraálitinum, ið varð gjørt í fjør.

### Seta ferð á

Størsta upphæddin av øllum skulu tó brúkast til at halda fram við arbeiðnum at breiðka Marknagilsvegin, tí nú ætlar býráðið at seta ferð á tað arbeiðið fyri at fáa tað lidnar. Í ár verða sostatt 11,35 milliónir settar av til tað endamálið.

Afturat tí hevur Tekniska nevnd mælt til at seta 250.000 krónur av til at gera eina rundkoyring lidna.

### Vildu hava meiri

Flestu býráðslimir, sum høvdu orðið, fegnaðust um framgongdina sum gjørdi, at tað bar til at fara undir nakað nevnivert av íløgum aftur.

Tó hildu teir flestu, at býurin var so illa slitin nú, at tað var neyðugt við einum ódnartaki fyri at fáa hann uppundan aftur.

Tí kundu teir saktans hugsa sær at gjørt fleiri íløgur, um tað hevði borið til.

Og hevði Landsstýrið ikki álagt kommununi ein løgukarm uppá 32 milliónir, er onki at ivast í, íløgurnar høvdu verið væl hægri, tí onkur býráðslimur segði, um um íløgukarmurin var bæði tvær og tríggjar ferðir so stórur, sum hann er, so hevði tað ikki staðið á at fylt hann kortini, so nógv sum liggur á láni at gera í Kommununi.

Einasta atfinning ímóti íløguætlanini kom frá Kaldbaksmanninum Páll Petersen, sum fýltist á, at ikki eitt oyra av tí, sum skuldi brúkast til barnaansing og eldraøki, bleiv brúkt í Kaldbak og tað átalaði hann harðliga.

– Ein skuldi trúð, og kaldbaksfólk ikki átti børn, helt hann.

Elin Lindenskov, formaður í Sosialu nevnd, svaraði, at býráðið hevði raðfest íløgurnar til barnaansing til tey økini, har neyðin var størst, og tað er í vesturbýnum og á Argjum.



*Tórshavnar Kommuna hevur stórar ætlanir í ár. Men slapp býráðið, kundi tað gott brúkt bæði tvær og tríggjar ferðir so nógv, tí nógv liggur á láni. Á býráðsfundinum hóskvøldið vórðu íløgur fyri yvir 30 milliónir samtyktar*

# Fimm milliónir eyka í ár

*Viðhvørt loysir tað seg at brúka høvdið. Tað gjørdi Tórshavnar Býráð og tað bjargaði Havnini 5 milliónir eyka til íløgur í ár*

Áki Bertholdsen

Við hvørt kann tað loysa seg at brúka høvdið.

Tað er fíggjarpolitikkurin hjá Tórshavnar Býráð eitt gott dømi um.

Tí við høvuðbrýggi og góðum hugflogi hevur Tórshavnar Býráð útvegað sær 5 milliónir meiri til íløgur í ár, enn tað hevði havt, um alt var sum vanligt.

Tó vildi býráðislimir langt í frá kalla hetta lumping og lirking. Men á býráðsfundinum hóskvøldið mátti býráðslimurin Jan Christiansen kortini viðganga, at hann hevði aldrin vænta, at hetta fór at ganga so at landsstýrið fór at góðkenna fíggjarætlanina.

Men glaður var hann kortini, tá ið Býráið fekk fíggjarætlanina aftur úr Tinganesi við blaá stemplinum hjá løgmanni á.

Kunsturin at fáa meiri pening til íløgur í Tórshavnar Kommunu í ár, er at gera nakrar snildisligar flytingar ímillum íløgur og rakstur.

Og tað er júst tað, sum býráðið nú hevur gjørt.

Higartil hevur kommunan plagað at seta asfalteringar og umvælingar av kloakkum undir íløgurnar.

Men í ár er tað sett undir tann vanliga raksturin.

Í ár fer kommunan at brúka fimm milliónir til hesi endamál, men hendan upphæddin verður nú fíggjað yvir sjálvan raksturin og fer tí ikki at nerva íløgukarmin sum tær plagdu.

Soleiðis fekk kommunan bjarga sær hesar fimm milliónirnar eyka til íløgur í ár.

### Onki løgi

Men hetta hildu býráðslimir ikki var nakað løgið.

Ronald Poulsen vísti á, at hetta vóru ikki íløgur, tí her var ikki talan um at gera nakað av nýggjum men at umvæla.

Leivur Hansen, býráðsformaður, segði, at hetta mátti ikki skiljast sum at Tórhavnar Kommuna ætlaði at snúgva sær undan avtaluni við Landsstýrið um íløgukarmin í ár.

– Heldur skal hetta síggjast sum eitt úrslit av at býráðið er blivið meiri tilvitað um, hvat skal bólkast undir rakstur og, hvat skal bólkast undir íløgur.

Torfinn Smith segði, at býurin var so illa farin undir kreppuni, at tað kravdi stór tiltøk at fáa hann uppundan aftur. Tí kundi vanligt viðlíkahald onkuntíð síggja út sum íløgur.

Eisini aðrir tóku undir við, at býráðið var farið undir eina meiri kritiska gjøgnumgongd av, hvat er íløgur og hvat er rakstur.



*Býráðslimir í Havn vilja ikki kalla hetta at lumpa landsstýrið. Men onkur teirra mátti tó viðganga, at hann hevði aldrin rokna við, at tað fór at ganga*

Hotel Föroyar Tlf. 317500
FERMINGAR
TILBOÐ
Ætla tit at gera dagin minnisríkan við góðum mati -ringið so tel. 317500 og fáið nærri at vita
Vit kunnu bjóða 3 rættir fyri kr. 160,- 1/2 prís fyri børn undir 12 ár.
Eisini hava vit ókeypis matkoyring í býin.
Eisini fæst bílig gisting
Altíð vælkomin á
Hotel Föroyar Tel. 317500
Best Western
Sosialurin - 311820